# Ongin fólkapensjón til tey við góðari løn

**Hereftir skal fólkapensjónin og samhaldsfasti bara brúkast til at tryggja teimum lágløntu eina nøktandi eftirløn, men tey við høgari løn skulu sjálvi betala sína eftirløn**

EFTIRLØN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Teir føroyingar, sum hava høgar lønir, skulu hereftir hvørki fáa fólkapensjón ella útgjald úr samhaldsfasta, tá ið tey koma til eftirlønaraldur.

Tað heldur Tjóðveldisflokkurin, nú Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur lagt uppskot fyri fakfeløgini um eina nýggja eftirlønarskipan.

Grundleggjandi sjónarmiðið hjá Tjóðveldisflokkinum er, at hvør einasti føroyingur skal hava eina nøktandi eftirløn, tá ið teir leggja arbeiðsmarknaðin afturum.

– Í flestu førum skulu tað verða eftirlønar samansparingar ígjøgnum eitt langt arbeiðslív, sum skulu fíggja eftirlønina.



*– Tey, sum hava góða løn og sum kunnu spara saman til sína egnu eftirløn, skulu missa rættin til fólkapensjón og útgjald úr Samhaldsfasta, sigur Finnur Helmsdal*

Men so verða tað eisini nakrir føroyingar, sum av einhvørjari orsøk ígjøgnum arbeiðslívið, ikki hava megnað at spart saman til sína egnu eftirløn.

Tað kann vera tí at tey hava havt so lága løn, at tað hevur ikki borið til at spart saman til eftirlønina. Men tað kann eisini vera tí at tey hava havt avlamispensjón ella fyritíðarpensjón og sostatt ongan møguleika hava havt at spart saman til eftirløn. Ella tað kunnu vera aðrar orsøkir til at tey ikki hava kunnað megnað, at spart saman til eftirlønina.

Hesi fólkini skulu vit eisini tryggja eina nøktandi eftirløn, sigur talsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum.

Men hann staðfestir, at tað kann bara gerast við eini skipan, sum øll eru við til at fíggja.

Tí heldur Tjóðveldisflokkurin, at tað er neyðugt at gera eina samhaldsfasta skipan, sum øll betala til, men sum einans skal brúkast til at tryggja teimum eina nøktandi eftirløn, sum ikki sjálvi hava megnað at spart saman til hana.

– Vit halda, at tann upphæddin, sum landið nú brúkar til fólkapensjónir og Samhaldsfasti, skulu setast í ein samhaldsfastan eftirlønargrunn, sum skal brúkast til at tryggja øllum eina nøktandi eftirløn.

Men tað merkir, at tey, sum hava eina góða eftirlønarsamansparing, sum tryggjar teimum eitt nóg høgt eftirlønarútgjald, skal onki fáa úr grunninum, hvørki fólkapensjón ella samhaldsfasta.

– Sostatt skal hesin samhaldsfasti eftirlønargrunnurin brúkast til at javna við, so at øll fáa eina nøktandi eftirløn.

Men hvussu høgt gjaldið skal verða, áðrenn tey missa rættin til fólkapensjón, hevur Finnur Helmsdal ikki roknað út enn.

### Neyðugt við serligari skipan

Tað merkir so eisini, at Samhaldsfasti skal grundleggjandi broytast, tí eftir uppskotinum hjá Tjóðveldisflokkinum, skulu tey vælløntu heldur ikki skulu fáa nakað úr Samhaldsfasta, hóast tey betala í hann.

– Tey, sum hava góðar lønir, hava allar møguleikar at spara saman til sína egnu eftirløn og tí eiga tey heldur ikki at fáa rætt til fólkapensjón og útgjald úr Samhaldsfasta.

– Men tað er neyðugt við eini dyggari, samhaldsfastari skipan afturat eini skipan við samansparing, tí tað verða altíð ein bólkur, sum ikki megnar at spara saman til sína egnu eftirløn. Og ein samhaldsføst skipan, sum verður brúkt at javntseta eftirlønirnar við, kann tryggja at allir føroyingar fáa eina virðiliga eftirløn.

Men tað er júst tað, sum fakfeløgini eru ímóti, tí tey vilja ikki, at Samhaldsfasti skal rørast?

– Tað er rætt. Men samstundis vilja tey hava eina góða eftirløn. Og tað er púra greitt, at skal landskassin eisini í framtíðini fíggja ein munandi part av eftirlønini, vera tað ørandi upphæddir, sum skulu setast av á fíggjarlógini til eftirlønir og tað er ein stórur spurningur, um landskassin hevur ráð til tað.

– Skulu tey vælløntu eisini hava fólkapensjón úr landskassanum, er spurningurin, um ráð eisini verða til at tryggja teimum veikastu eina nøktandi eftirløn.

Tað skerst heldur ikki burtur, at tey, sum fáa góða løn, fáa mestsum eina eftirlønarskipan fyri einki ígjøgnum sáttmálarnar á arbeiðsmarknaðinum. Hinvegin mugu arbeiðarafeløgini sleppa krøvum um lønarhækkingar fyri at fáa eitt nøkur oyrur upp á eftirlønina, leggur talsmaður Tjóðveldisfloksins afturat.

# Gott fyri tey við góðari løn og ringt fyri tey við lágari løn

**– Nýggja uppskotið hjá Bárði Nielsen til eina nýggja eftirlønarskipan, tryggjar ikki teimum við lágari løn eina góða eftirløn**

EFTIRLØN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta fer at staðfesta munin á teimum vælbjargaðu og teimum og teimum minnu mentu.

Finnur Helmsdal, sum er talsmaður hjá Tjóðveldisflokkinum í eftirlønarmálum, tekur ikki undir við uppskotinum til eina nýggja eftirlønarskipan, sum Bárður Nielsen legði fram fyrr í vikuni.

Skiftandi landsstýri hava í fleiri ár arbeitt við at gera eina nýggja eftirlønarskipan.

Tí var tað við stórum spenningi, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum legði eitt uppskot frá einum arbeiðsbólki fyri fakfeløgini fyrr í vikuni.

Tað er ymiskt, hvussu



*- Nýggja uppskotið um eftirløn hevur alvorliga, sosiala slagsíðu, tí tað verður ikki hugsað nóg nógv um teir pensjónistarnar, sum eru ringast fyri, heldur Finnur Helmsdal úr Tjóðveldisflokkinum. Myndin er tilvildarlig*

hendan nýggja eftirlønarskipanin verður móttikin.

Í Sosialinum í gjár fanst forkvinnan í landsins størsta fakfelag, Ingeborg Vinther í Føroya Arbeiðarafelag, hvassliga at ymsum tættum í ætlanini.

Og talsmaðurin hjá størsta andstøðuflokkinum, Tjóðveldisflokkinum er heldur ikki serliga fegin um ætlanina.

### Sosial slagsíða

Finnur Helmsdal fegnast um, at eitt uppskot um eina eftirlønarskipan er komin.

Men hann staðfestir samstundis, at uppskotið hevur alvorliga, sosiala slagsíðu.

– Stóri feilurin við hesum uppskotinum er, at tað verður hugsað alt ov lítið um øll tey, sum ikki hava verið á arbeiðsmarknaðinum. Tað verður heldur ikki hugsað nóg nógv um tey, sum ikki hava arbeitt so nógv, kanska av sjúku ella brekið. Tað verður heldur ikki hugsað um tey lágløntu og tað verður heldur ikki hugsað um tey, sum longu eru komin upp í árini og sostatt ongan møguleika hava at spara saman til eina nøktandi eftirløn.

Allir hesi bólkarnir fara ikki at fáa eina nøktandi eftirløn eftir hesum nýggja uppskotinum.

– Hinvegin skulu tey, sum hava góðar lønir og góð kor, eisini hava tær bestu eftirlønirnar.

Finnur Helmsdal sigur, at sostatt hevur nýggja uppskotið eina sosiala slagsíðu, tí tað fer ikki at gera gjónna ímillum tey vælløntu og tey lágløntu smalari.

### Týðandi vælferðartænasta

Hann sigur, at verður uppskotið hjá landsstýrinum sett í verk nú, fer tað at taka 30-40 ár hjá hvørjum einstøkum at spara saman til eina nøktandi eftirløn.

Tí er tað neyðugt, at finna skipanir, so at tey, sum av einhvørjari orsøk, ikki hava so høga inntøku, ella eru komin upp í árini, eisini kunnu fáa eina nøktandi eftirløn til ein skipan við samansparing kann virka nóg væl um eini 30-40 ár.

– Eg haldi, at tað veika punktið í uppskotinum hjá Bárði Nielsen, er, at tað verður hugsað ov nógv um tey, sum sjálvi hava møguleika at spara saman til eina góða eftirløn.

– Og tað er enntá ætlanin, at tey, sum sjálvi kunnu spara saman til eftirlønina, eisini skulu fáa fólkapensjón afturat.

Men nú stendur í uppskotinum hjá Bárði Nielsen, at endamálið er at tryggja øllum góð og virðilig kor og at tryggja vælferðatænasturnar?

– Eg vildi meint, at ein nøktandi eftirløn til allar føroyingar, er ein av okkara mest týðandi vælferðartænastum. Men tað tykist sum um at hendan vælferðartænastan er gloymd í hesum nýggja uppskotinum, sigur Finnur Helmsdal.